| TÓRSHAVNAR BÝRRÁÐ<br>25. november 2004 | Blað nr.:<br>**6012**<br>Formansins merki: |
|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato: 25. november 2004**
**Stað: Býráðssalurin**
**Málsnr: 148/04-169/04**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Jan Christiansen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Høgni Mikkelsen
Bjarti Mohr
Schumann Hjaltalin
Sjúrður Olsen
Beate L. Samuelsen
Tórfinn Smith
Hildur Eyðunsdóttir
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Jan Christiansen
Annfinn Brekkstein fyri Kirkjubøar kommunu
Jógvan Thomsen fyri Nólsoyar kommunu

**LUTTÓK IKKI:**
Jákup Suni Joensen
Elin Lindenskov

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**154/04** **200400038**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 25. november 2004:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðið samtykti uttan atkvøðugreiðslu, at viðgera mál nr. 169/04 fyrst.**

**155/04** **200300429**

**Umlegging av spillvatnsútleiðingum á vestaru vág**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Víst verður til mál 200200712 (Oljudálking á Havnarvág).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at fíggja kostnaðin fyri eykaarbeiði, 0,5 mió. kr., av avsettu íløgum fyri kloakkir fyri fíggjarárið 2004.

**Tekniska nevnd 2. november 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 500.000,00 av íløgum 2004 til kloakkir.

**Býráðið 25. november 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**156/04** **200102421**

**Mál um yvirtøku/keyp av sluppini "Westward Ho" XPXS.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Víst verður til mál j. nr. 200102421 – Umsókn frá Grunninum sluppini, dagfest 12. november 2003, um stuðul til at umvæla Westward Ho.

Nú fyriliggur uppskot til skeyti til keyp av sluppini fyri eina krónu.

Eisini fyriliggur uppskot til reglugerð fyri sluppina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og havnameistarin mæla til at keypa Westward Ho fyri eina krónu og at góðtaka uppskot til reglugerð.

**Fíggjarnevndin 18. november 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. november 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Høgni Mikkelsen fór av fundi meðan mál nr. 157/04 varð viðgjørt.

**157/04** **200301757**

**Mál um servitutt um framíhjárætt til at keypa randar- ella samanbygd hús á byggilendi sum er keypt frá kommununi.**

Advokatskrivstovan hevur vent sær til kommununa við áheitan um at strika servituttin um

"Við fyrsta útboði til sølu av bústaðareindum hava tey, sum standa á bíðilista hjá býráðnum til íbúð, hús ella grundstykki, eftir ávísing frá kommununi, framíhjá-rætt. Eftir at fyrsta søla av liðugtbygdari bústaðareind er farin fram, fellur hesin framíhjárættur av sær sjálvum burtur."

Við tilvísing til, at ásetingin onga meining hevur longur, tí byggitakararnir vísa á, at talan er um eina áseting, sum er ógjørlig at praktisera.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at strika servituttin.

**Fíggjarnevndin 18. november 2004:** Samtykt at leggja málið fyri býráðið.

Ein minniluti, Jan Christiansen, mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum.

**Býráðið 25. november 2004:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Leivur Hansen um at beina málið aftur í fíggjarnevndina, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Tórfinn Smith, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen

Greiddu ikki atkvøðu: Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

- Nú fór Jákup Suni Joensen.

**158/04** **200402642**

**Útgjalding av láni frá Havnar Arbeiðsmannafelag.**

**Fíggjarnevndin 18. november 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at útgjalda eitt lán frá Havnar Arbeiðsmannafelag uppá tkr. 4.000 og at fíggja hetta við hækking av inntøkum av pf-skatti, soleiðis at samlaða fíggjarætlanin javnvigar við tkr. 447.600.

**Býráðið 25. november 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**159/04** **9902581**

**Broytingar í kommunustýrisskipanini nú 3 nýggjar staðbundnar nevndir eru í kommununi.**

**Nýggj § 33**
**Nólsoyarnevndin**

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum í Nólsoy verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar í Nólsoy eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

**2. petti.** Nólsoyarnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar í Nólsoy at gera.

## Nýggj § 34
## Kirkjubøar- Velbastaðarnevndin

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum í Kirkjubø og á Velbastað verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar í Kirkjubø og á Velbastað eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

**2. petti.** Kirkjubøar- og Velbastaðarnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar í Kirkjubø og á Velbastað at gera.

## Nýggj § 35
## Hest- Koltursnevndin

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum í Hesti og Koltri verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar í Hesti og Koltri eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

**2. petti.** Hest- Koltursnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar í Hesti og Koltri at gera.

Harumframt verður verandi

§ 33 broytt til § 36
§ 34 broytt til § 37
§ 35 broytt til § 38
§ 36 broytt til § 39
§ 37 broytt til § 40

**Fíggjarnevndin 18. november 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við broytingunum.

**Býráðið 25. november 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**160/04** **200402519**

**Uppsøgn frá Marius Müller, dagfest 27. oktober 2004, úr starvinum sum tekniskur stjóri frá 31. desember 2004.**

**Fíggjarnevndin 18. november 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka uppsøgnina til eftirtektar.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Schumann Hjaltalin, mælir til, at starvið verður lýst leyst beinanvegin.

Ein annar minnilut, Heðin Mortensen og Leivur Hansen, mælir til at bíða við at lýsa starvið leyst, til bygnaðurin er endurskoðaður saman við umsitingini.

**Býráðið 25. november 2004:** Fyrst varð atkvøttt um minnilutatilmæli hjá Heðin Mortensen og Leivur Hansen í fíggjarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 5 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen.

Ímóti atkvøddu: Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Schumann Hjaltalin, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Tórfinn Smith.

Síðan varð atkvøttt um minnilutatilmæli hjá Jan Christiansen og Schumann Hjaltalin í fíggjarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 5 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Schumann Hjaltalin, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Leivur Hansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Tórfinn Smith.

**161/04** **200400092**

**Dagstovnur- og býlingshús á Velbastað.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í samband við kommunusamanleggingina millum TK og Kirkjubø og Velbastaðar kommunu er avtala gjørd um at byggja ein dagstovn/býlingshús á Velbastað.

Byggi-og býarskipanardeildin hevur í samráð við bygdaráðið í Kirkjubø og Velbastað víst á eitt hóskandi øki at fremja verkætlanina.

Planleggingardeildin hevur sett upp eina økisskipan fyri verkætlanina, sum fevnir um:

| | |
|---|---|
| Dagstovn til 60 børn sum eisini skal virka sum býlingshús: | uml. 660 m² |
| Rørslurúm uml. 12 x 17 m: | uml. 204 m² |
| Uttanumøki beinleiðis knýtt at stovninum: | uml. 6000 m² |
| Uttanumøki tengt at stovninum: | uml. 3000 m² |
| Parkeringspláss til uml. 20 bilar: | uml. 650 m² |

Sum partur av verkætlanini er teknaður ein rundkoyring uml radius 32 m. Hetta er tó ikki beinleiðis tengt at verkætlanini, men víst á tekningini sum ein máti at skipa økið ferðsluliga. Víst hevur verið á, at serstakliga stór ferðsla hevur stórar trupulleikar undir verandi umstøðum.

Tekning j. nr. : 200301239- 2.

Vísandi til at umsitingin ikki hevur havt tíð at seta seg inn í býarskipanina fyri Kirkjubø og Velbastaðar kommunu, kunna smærri broytingar koma fyri.

Fólkið fyri vestan hava sagt, at festarin av lendinum er sinnaður at lata jørðina til stovnin.

Skeyti upp á matr. skula fáast til vega, og vera kannað fyri servituttir o.a.
Eftir er eisini at kanna: Skógfriðingarmyndugleikar og aðrar avvarðandi myndugleikar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin samtykkir at taka undir við nýggju verkætlanini, so arbeiðast kann víðari við málinum

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býararkitektinum, og at stovnurin verður bygdur í samsvari við samanleggingarsáttmálan millum Kirkjubøar kommunu og Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Býlingshúsið/dagstovnurin skal hvør rúma 2 barnagarðsstovum til 18 børn hvør, 1 vøggustovu til 12 børn og 1 høli til frítíðarskúla til 20 børn.

Byggi- og býarskipanardeildin hevur gjørt útbjóðingartilfar, dagfest 27. mai 2004, har arbeiðið verður boðið út sum totalarbeiðstøka í almennari lisitatión.

Á kommunustýrisfundi í Kirkjubø 27. mai 2004 kunnaði Jan Christiansen um útbjóðingartilfar til lisitatión til nýggjan barnagarð á Velbastað.

Kirkjubøar kommuna hevur gjørt viðmerkingar til tilfarið, dagfest 1. juni 2004.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáladeildarleiðarin mæla til at góðkenna útbjóðingar-tilfarið, dagfest 27. mai 2004, og at viðmerkingarnar frá Kirkjubøar kommunu verða tiknar við í útbjóðingini, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 3. juni 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. juni 2004:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera nýggjan dagstovn/býlingshús á Velbastað varð boðið út í almenna heildararbeiðstøku. Inn komu 12 tilboð frá 8 tilboðsgevarum, harav 2 bjóðaðu uppá sama stovn. Ein dómsnevnd varð sett at viðgera tilboðini og er liðug við sítt arbeiði. Dómsnevndarúrskurðurin verður lagdur fyri nevndina.

**Mentamálanevndin 16. november 2004:** Mentamálanevndin tekur undir við dómsnevndarúrskurðinum, dagf. 11. november 2004, og mælir býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá Búsetur Sp/f uppá kr. 9.723.000 uttan mvg.

Samlaður kostnaður fyri stovnin íroknað óvæntaðar útreiðslur, eftirlit, innbúgv og 6,25% mvg verður kr. 12.677.000.

Eisini samtykt at mæla til at játta kr. 3.534.000 av íløgum 2004 á barnaansingarøkinum (og restíløgan verður sett av í 2005 og 2006).

**Fíggjarnevndin 18. november 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 25. november 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**162/04** **200402675**

**Viðv. sølu av ognunum matr. nr. 1381e og 1381f – seljari p.f. Tefonverkið og keypari p.f. Svend Krosstein.**

Umsókn frá Bjørn á Heygum, adv., dagfest 16. november 2004, um loyvi til søluna, og at kommunan sigur forkeypsrættin, sambært skeytinum, frá sær.

**Fíggjarnevndin 18. november 2004:** Ein minniluti, Jan Christiansen og Schuann Hjaltalin, samtykti, at kommunan frásigur sær forkeypsrættin.

Leivur Hansen krevur málið fyri býráðið.

Heðin Mortensen tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðið 25. november 2004:** Atkvøtt varð um minnilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen, Tórfinn Smith Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir og Jógvan Arge

Greiddi ikki atkvøðu: Leivur Hansen.

**163/04** **200302407**

**Fíggjarætlan 2004- eykajáttan.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kommunustýrislógini kann kommunustýrið, um neyðugt, veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.

| | | |
|---|---|---|
| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>25. november 2004 | Blað nr.:<br>6021 | Formansins merki: |

Niðanfyri nevndu eykajáttanir eru játtaðar í fíggjarnevndini.

| **Endamál** | **Hækking á konto** | | **Upphædd** |
|---|---|---|---|
| Vegir og gøtur | 11 | kr. | 653.000 |
| Vatn og gøtuljós | 14 | - | - 613.000 |
| Brennistøðin | 15 | - | 2.451.000 |
| Asfalt og ferðsla | 16 | - | - 603.000 |
| Sløkkiliðið/verkstaðið | 19 | - | 1.116.000 |
| Kollafjarðar skúli | 24 | - | 538.000 |
| Kommunuskúlin | 25 | - | 1.247.000 |
| Venjingarskúlin | 26 | - | 1.485.000 |
| Eysturskúlin | 27 | - | 408.000 |
| Sankta Frans skúli | 28 | - | 713.000 |
| Hoyvíkar skúli | 29 | - | 139.000 |
| Argja skúli | 30 | - | - 341.000 |
| Býarsavnið | 34 | - | 324.000 |
| Býarbókasavnið | 35 | - | 90.000 |
| Svimjihøllin | 36 | - | - 322.000 |
| Stadion | 37 | - | 241.000 |
| KT til kommunulæknar | 41 | - | 696.000 |
| Tannlæknastovan | 42 | - | 980.000 |
| Nýútveganir | 63 | - | 3.217.000 |
| Íløgustuðul | 64 | - | 1.636.000 |
| Útskiftan av amboðum | 68 | - | - 827.000 |
| Onnur hús | 82 | - | - 2.828.000 |
| Íløgur | 90 | - | 61.049.000 |
| Barnaansing | | - | 1.800.000 |
| **Framfluttar játtanir íalt** | | **kr.** | **73.249.000** |
| | | | |
| Vegur í Sandvíkum | 90 | - | 480.000 |
| Vesturkirkjan | 90 | - | 700.000 |
| Havnakórið | 39 | - | 25.000 |
| Múllers pakkhús | 82 | - | 500.000 |
| Tekniska deild | 03 | - | 350.000 |
| Rullufjalabreyt | 38 | - | 350.000 |
| Tjarnargarður | 90 | - | 1.100.000 |
| Ùtstykking í Hoyvík | 90 | - | 294.000 |
| Veg og lyft til FSF | 90 | - | 300.000 |
| Grunnurin Sluppin | 39 | - | 1.000.000 |
| Vegur í Havnadali | 11 | - | 400.000 |
| Tórsh. Froskmannafelag | 39 | - | 75.000 |
| Miðstøð fyri minnisveik | 90 | - | 419.000 |
| Standmynd | 39 | - | 100.000 |
| Meinigheitin í Hoyvík | 83 | - | 294.600 |
| Ábøtur á Hvalvág | 90 | - | 250.000 |
| Býarbókasavnið | 35 | - | 112.000 |
| **Játtað av reguleringskonto íalt** | | **kr.** | **6.749.600** |

**Býráðið 25. november 2004:** Eykajáttaninar vóru einmælt samtyktar.

**164/04** **200201185**

**Mál um at fáa ognina, matr. nr. 290a, Signabøur, broytta frá landbúnaðarøki til bústaðarøki.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært heildarætlanini fyri Kollafjørð er ætlanin at broyta økið til bústaðarøki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri økið verður broytt sambært heildarætlanini fyri Kollafjørð.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. oktober 2004:** Nevndin samtykti, at umsitingin ger uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri eitt størri øki at leggja fyri nevndina aftur, eftir at málið hevur verið til hoyringar í kollfjarðanevndini.

**Kollfjarðarnevndin 7. oktober 2004:** Samtykt at mæla til, at økið verður lagt av til sethúsaøki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 25. oktober 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, soleiðis at byggisamtyktin verður broytt samsvarandi tekning, dagfest 25. oktober 2004, og signerað á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. november 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 25. november 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**165/04** **200400613**

**Broyting av byggisamtykt fyri Kollafjørð**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at ætlanin í j. nr. 200202500 "Uppskot um framtíðar byggisamtykt fyri Kollafjørð" verður samtykt sum ein framtíðarætlan fyri Kollafjørð, er hetta nýggja málið um broyting av byggisamtykt fyri Kollafjørð stovnað.

Umsitingin metir, at tað er neyðugt at broyta partar av byggisamtyktini fyri Kollafjørð beinanvegin, soleiðis at nøkur nýggj byggiøki verða løgd út, og soleiðis at heitini og ásetingarnar fyri tey ymisku økini verða tey somu sum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Sí kortskjal j.nr. 200400613-5.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt sambært kortskjali.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2004:** Málið snýr seg um at útvega grundøki til sethúsabygging og øki til miðstaðarbygging.

Nevndin samtykti at taka undir við ætlanini og at beina málið í býráðið.

**Kollfjarðarnevndin 15. mars 2004:** Samtykt at mæla til at taka undir við tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Býráðið 18. mars 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur í skrivi, j. nr. 200302155-1, móttikið viðmerkingar til ætlanir hjá Tórshavnar kommunu um at broyta ásetingarnar fyri økið, ið viðkemur festið Sjóaargarður Niðari partur”.

Orsakað av innanhýsis skráseting hevur skrivið ikki verið við í viðgerðini av málinum, og tað er tískil neyðugt, at málið verður lagt fyri nevndina aftur, soleiðis at málið kann viðgerast við støði í øllum fyriliggjandi upplýsingum.

Hjálagt er skriv, j. nr. 200302155-1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt sambært kortskjali j. nr. 200400613-5.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. apríl 2004:** Samtykt at tann parturin, ið skrivið umfatar, j. nr. 200302155-1, skal viðgerast av nýggjum og verður beint í kollfjarðanevndina.

**Kollfjarðarnevndin 1. juni 2004:** Nevndin mælir til at tikið verður undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektium viðvíkjandi byggisamtyktini fyri Kollafjørð.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. juni 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Býráðið 24. juni 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti.**
Freistin at mótmæla ætlaðu broytingunum av byggisamtyktini í Kollafirði var 5. oktober 2004.

Inn eru komin 3 mótmæli.

**Djóni Thomassen, adv. vegna Connie Dalsgaard:**
Mælt verður ímóti, at matr. nr. 156a, Kollafjørð, sunnan fyri vegin, sum nú er 4. grundumráði (landbúnaður), verður broytt til D1-øki (alment frílendi).

Økið verður í dag nýtt til framleiðslu av vistfrøðiligum høsnareggum, frá uml. 500 hønum.

Til hetta kann viðmerkjast, at D1-øki her er lagt í sambandi við Kirkjugarðin. Sjálvt um økið verður broytt til D1-øki (alment fríøki) kann framleiðslan av høsnareggunum halda fram sum nú, tó verður avmarkað hvat kann byggjast á økinum

**Christian Andreasen, adv. vegna Gunnvør Dam Jensen, festari á Sjóargarði:**
Mælt verður ímóti, at økið "Norðíki", sum nú er 4. grundumráði (landbúnaður), verður broytt til D3-øki (alment endamál).

Eisini verður mótmælt, at økið oman fyri skúlan/ítróttarhøllina, sum nú er økið til almenn endamál, verður broytt til A1-øki (bústaðarbygging).

Orsøkin til kæruna er, at festarin missir rættin til vetrarbit/stráfóður á hesum økjunum, og at hetta fer at taka grundarlagið hjá festinum burtur.

Til hetta er at viðmerkja, at í økinum "Norðíki" er m.a. ætlanin at byggja eina nýggja kirkju.

Økið oman fyri skúlan er, sambært verandi byggisamtykt, lagt út til almenn endamál. Men í sambandi við at kommunan hevur gjørt eina skipanarætlan av økinum, har skúlin og ítróttarhøllin liggja, er tann ovasti parturin lagdur til bústaðarbygging.

Roknast má við, at tað ganga nøku ár, áðrenn hesi økini verða bygd. Og sjálvt um byggisamtyktin verður broytt, verður hetta framvegis ein partur av festinum á Sjóargarði og kann nýtast til vetrarbit/stráfóður.

**Christian Andreasen, adv. vegna Sp/f Carl August Jensen:**
Mælt verður ímóti, at øki niðanfyri handilin, oman móti landsvegnum, verður lagt út til D1-øki (alment fríøki).

Økið vestan fyri handilshúsini er lagt út til C-øki (miðstaðarbygging).

Í kæruni verður víst á, at økið niðanfyri virkisbygningin oman móti landsvegnum eisini átti at verði lagt út til miðstaðarbygging, tá eitt virki er har á staðnum.

Til hesa kæruna kann viðmerkjast, at fyri júst hetta økið, er eingin ætlað broyting frá verandi byggisamtykt fyri Kollafjørð.

Eisini skal vísast á, at verandi handilsbygningur liggur uml. 20 m frá vegmiðju á landsvegnum niðanfyri, og Landsverkfrøðingurin vanliga krevur eina frástøðu uppá í minsta lagi 20 m frá bygningum til vegmiðju.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at halda fast um ætlaðu broytingarnar.

**Kollfjarðarnevndin 7. oktober 2004:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 25. oktober 2004:** Eftir at innkomnu mótmælini vórðu viðgjørd, samtykti nevndin at mæla býráðnum til at halda fast við ætlaðu broytingina og at beina málið í Kollfjarðanevndina til kunningar.

**Kollfjarðarnevndin 18. november 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. november 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**166/04** 200402566

**Val av limum og varalimum til stýrið fyri Als.**

Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum skal velja limir og varalimir til stýrið fyri ALS, og heitt verður tí á felagið/stovnin at lata inn uppskot til landsstýrismannin innan ásettu freistina, sum er 22. november 2004.

Ein limur og ein varalimur verða valdir eftir uppskoti frá arbeiðsgevarunum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Hesir eru fíggjarmálaráðið, Føroya Kommunufelag, Tórshavnar býráð og ríkisumboðsmaðurin.

**Býráðið 25. november 2004:** Tórshavnar kommuna innstillar Jan Christiansen, Beate L. Samuselsen, Leivur Hansen og Hildur Eyðunsdóttir.

**167/04** **200402573**

**Val av limum og varalimum til ávikavist kærunevndina fyri Arbeiðsloysis-skipanina og kærunevndina fyri Barsilsskipanina.**

Fyri báðar kærunevndirnar er galdandi, at kærunevndin hevur 3 limir, ein umboðandi løntakara, ein umboðandi arbeiðsgevarar og ein formann, ið skal vera løgfrøðingur.

Samstundis verða vald varafólk, ið taka sæti í nevndini, tá limi berst frá.

Starvsskeiðið er 4 ár, tó so at nevndarlimur verður sitandi, til nýggjur er valdur.

Kommunan verður biðin um at skjóta upp lim og varlim til báðar kærunevndirnar innan 22. november 2004.

**Býráðið 25. november 2004:** Tórshavnar kommuna innstillar Tórfinn Smith, Beate L. Samuelsen, Elin Lindenskov og Jógvan Arge.

**168/04** **200402674**

**Val av friðingarnevndum.**

Í friðingarnevndirnar, sum virka í hvørjari sýslu, skulu veljast 2 fastir limir umframt 4 tiltakslimir.

Í yvirfriðingarnevndina skulu veljast 2 fastir limir umframt 4 tiltakslimir.

Heitt verður á kommununa um at koma við uppskotum um skikkaðar limir til nevndirnar. Vísandi til javnstøulógina verður mint á, at kvinnur og menn skulu verða javntbjóðis umboðað í nenvdunum.

Uppskotini skulu verða gjørd innan 1. desember 2004.

**Býráðið 25. november 2004:** Tórshavnar kommuna innstillar Jógvan Thomsen, Anfinn Brekkstein, Jóhannu Arge og Turid Kjølbro.

**169/04** **200401434**

**P/F Sundsneystini Magnus S. Petersen: Umsókn um leigu av lendi á Sundi til bygging av neystum**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um leigu av lendi til bygging av neystum inni á Sundi

Umsitingin hevur ikki havt tíð at viðgera málið, men avtala er gjørd við umsøkjaran um at koma á fundin at kunna nærri um verkætlanina, soleiðis at nevnd og umsiting kann fáa betri hóming av, hvat málið snýr seg um.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 7. juni 2004:** Magnus Petersen og Hákun Steingrímsson greiddu frá ætlanini.

Nevndin samdist um, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umboð fyri stigtakararnar hava verið á fundi við umsitingina og hava víst á, hvat økið ætlanin skal fremjast á.

Tekningar av verkætlanini eru innkomnar.

Ætlanin er at byggja 3 lonir av neystum. Lonirnar koma at standa longs við bryggjukantin.

Niðasta lonin: Ein dupultrøð ætlað at rúma 48 neystum (2 x 24) er til longdar 89 m og til breiddar 18,60 m. Fyribils ætlanin er, at neystini verða til longdar 9m breið 3,50 m og hurðahæddin verður 3,50 m

Miðlonin: Ein dupultrøð ætlað at rúma 36 neystum (2 x 18) er til longdar 93,8 m og til breiddar 24,6 m. Fyribils ætlanin er, at neystini verða til longdar 12 m, breiddar 5 m og hurðahæddin verður 5 m.

Ovasta lonin: Ein eikulttrøð ætlað at rúma 18 neystum (1 x 18) er til longdar 89 m og til breiddar 12,4 m. Fyribils ætlanin er, at neystini verða til longdar 12 m, breiddar 5m og hurðahæddin verður 5 m.

Millum neystalonirnar eru 15 metrar til tess at geva gott pláss í sambandi við dráttin av bátunum.

Strekkið frá vegginum á niðastu lonini til bryggjukantin er 36 metrar.

Omanfyri ovastu lonina hava vit lagt av parkeringsbásar til 25-30 bilar, sum skuldi verið hóskandi.

Upptøkan av bátunum er við syðra bryggjukant, sum er til longdar 12-14 metrar og har er so ætlanin at taka bátarnar upp, so tað eigur at verða ein partur av tí leigaða lendinum.

Annað alternativ:
Víst var á av tykkum um tað kundi verið eitt alternativ hjá okkum, at kommunan ístaðin læt lendi sunnan fyri bryggjuna planerað og leigaði hetta út til okkara.

Fortreytin hjá okkum er, at tað fíggjarliga ber til, og vit síggja ikki møguleikan fyri slíkari verkætlan. Vit kunna so ikki verða við í slíkum, tí tá fer kostnaðurin eftir okkara tykki út um alt mark, og vit fáa ikki tað nøgd av neystum, sum er fortreytin fyri at fáa tey niður í ein sømiligan prís. Hertil kemur, at vit arbeiða við eini tíðarætlan, har farið skal vera í holt við byggingina móti vári 2005, og alt skal verða liðugt í august mánað sama ár.

Skuldi eitt alternativ verið valt, so hevði besta staðið ikki verið inni á Sundi, men at Skálatrøð var tikin til endamálið, men tað er so onnur søga, sum vit upp á forhond ikki mettu fór at vinna frama.

Byggiloyvi:
Hvussu vit velja at lata neystini síggja út, er so upp til okkum at avgera, og tá er tað sjálvandi frammarlaga, at verkætlanin fíggjarliga hongur saman, og at vit fáa dygdargóð neyst. Vit eru fegnir um at tit vilja vera okkum góðir í ráðum um, hvussu neystini skulu síggja út, men tað verður so vent aftur til tað, tá søkt verður um byggiloyvi. Vit eru sjálvandi áhugaðir í, at tað verður ein snøgg bygging og eitt gott umhvørvi har.

Fyribils er so talan um at byggja tær lonirnar, sum vit hava víst á, og hetta víkir rættiliga nógv frá tí siðbundnu neystabyggingini, sum vanligt hevur verið í Føroyum, men helst er hetta bíligasta loysnin.

**Viðmerking:**
Um so er, at nevndin ætlar at leiga stigtakarunum omanfyrinevnda øki og at loyva bygging av neystum í B9 økinum er neyðugt at geva frávik frá byggisamtyktini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2004:** Umsitingin greiddi frá málinum.

Samtykt at heita á býararkitektin um at samráðast við umsøkjararnar við støði í uppruna uppskotinum.

**Ískoyti:**
Býararkitekturin hevur eftir áheitan gjørt uppskot til skipanarætlan inni á Sundi, sum í stórum byggir á teimum tankum, sum vóru førdir fram á fundinum 21. juni 2004 í byggi- og býarskipanarnevndini.

Hjálagt kortskjal j. nr.: 200401434-16 mát 1:2000

Hjálagt kortskjal j.nr.: 200401434-17 mát 1:500

Uppskotið hevur verið fyrilagt umsøkjaranum.
Somuleiðis hevur býarskipanardeildin kunnað umsitingina í Tórshavnar havn um uppruna umsóknina og uppskotið hjá býarskipanardeildini.

Skipanaruppskotið hjá býarskipanardeildini leggur upp til at arbeitt verður í tveimum stigum.

1. stig er staðsett á eystasta partinum av planeraða lendinum í einum uml. 65 metra breiðum øki, ið strekkir seg frá havsíðu og heilt niðan undir hinumegin vegin.
Økið er bygt við blandaðum støddum av neystum, og verður mett at rúma uml. 50 neyst á henda hátt.

2. Stig er staðsett eystan fyri Sundsá, og er meira skipað fram við vatnsíðuni, uml. 50 metrar niðan frá.

Hetta stigið verður mett at kunna húsa umframt einum verksmiðjubygningi, umleið 45-50 neystum. Fyrimunurin við at fara henda veg, er at vinnast kann tilfar á landi, at byggja bátahyl við og harvið skapa fleiri møguleikar fyri smábáta-umhvørvi í økinum.

Tórshavnar havn hevur latið inn skriv, hjálagt j. nr. 200401434-15.

Umsøkjarin hevur síðani latið nýggjar tekningar inn, har teir hava minkað verk-ætlanina nakað, og søkja nú um góðkenning og tilsøgn um leigu av lendi grundað á hesar. Hjálagt j. nr. 200401434-14.

Vísandi til at økið, talan er um, liggur í umráðispartinum B9, har *Umráðisparturin B9 verður lagdur til vinnu, ið beinleiðis ella óbeinleiðis eru útflutningsfremjandi og til virksemi, ið hava samband við hesar vinnur. Herumframt verður økið tryggjað til verandi elverk og seinni útbygging av verkinum,* skal støða takast til hvørs slík neystabygging kann loyvast, ella um ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri økið skulu broytast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til, um nevndin er sinnað at leiga umsøkjaranum økið samsvarandi nýggju umsóknini. Ella at nevndin heitir á umsitingina um at arbeiða víðari við málinum við atliti til uppskotið um skiparnarætlan frá býarskipanardeildini j. nr. 200401434-16 og skriv frá Tórshavnar havn, j. nr. 200401434-15, at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. august 2004:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til, um havnanevndina og fíggjarnevndina, at taka undir við uppskotinum um skipanarætlan frá byggi- og býarskipanardeildini um at skipa part av økinum á Sundi til neystabygging, har eisini bátahylur kann gerast, j. nr.

200401434-18. Endarligt uppskot verður at gera í samstarvi millum byggi- og býarskipanardeildina og Tórshavnar havn.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at taka undir við skrivi frá Tórshavnar havn j. nr 200401434-15. Í skrivinum verður mælt frá at byggja neystini á havna/ídnaðarøkinum, men heldur at arbeiða við einari langtíðarloysn fyri bátapláss, neyst, smiðju og felagshúsi á økinum eystan fyri havna/ídnaðarøkið.

**Havnarnevndin 14. september 2004:** Nevndin metir at málið um stig 1 er áhugavert, men metir ikki, at málið er klárt til støðutakan. Mælir til at nærri samráðingar verða tiknar upp við umsøkjararnar.

Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina. Biðið verður um at fáa málið aftur í havnanevndina.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið nýggja umsókn frá umsøkjarinum, har søkt verður um nýtt leiguøki. (Umsóknin er hjáløgd sum digital fíla við original journaliserað hjá TK)

Umsitingin hevur arbeitt víðari við ætlanini, sum varð send út í havnanevndina, og verður hon eisini løgd fram á fundinum. Umsitingin hevur ikki viðgjørt nýggju umsóknina, vísandi til samtyktina hjá byggi- og býarskipanarnevndini 23. august 2004, har greitt varð samtykt at arbeiðast skuldi víðari við uppskotinum hjá býarskipanardeldini, j. nr. 200401434-18.

Umsitingin fekk eina frágreiðing um nýggju verkætlanina frá umsøkjaranum, og hevur yvir fyri teimum víst á fleiri vansar við nýggju umsóknini í mun til uppskotið hjá býarskipanardeildini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. september 2004:** Nevndin er sinnað at broyta ásetingarnar fyri eystara part av B9 økinum í beinari linju frá verandi kaikanti, uml. 6.000 $m^2$, at umfata neystabygging og annað smábátavirksemi.

Eisini samtykti nevndin, at býararkitekturin samráðist við umsøkjararnar um at broyta byggiætlanina m.a. soleiðis, at tilkoyring verður innan fyri omanfyri nevnda øki, at leggja fyri nevndina aftur á komandi fundi.

**Ískoyti:**
Býararkitekturin hevur havt fund við umsøkjaran við tí endamáli at kunna um støðuna hjá byggi– og býarskipanarnevndini í málinum og fyri at kanna møguleikarnar fyri, at umsøkjarin kann skipa seg í samsvari við samtyktina hjá nevndini.

Umsøkjarin hevur greitt frá, at hann metir ikki hetta verða møguligt, og fer at koma við einum nýggjum uppskoti.

Umsitingin hevur gjørt skipanaruppskot, ið heldur seg til samtyktina, har hædd er tikin fyri ynskinum hjá umsøkjaranum um at útvega so nógv neyst sum til ber j. nr. 200401434.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. oktober 2004:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Schumann Hjaltalin og Jógvan Arge, samtykti at mæla býráðnum um havnanevndina og fíggjarnevndina at leiga umsøkjarunum økið vídd 6.290 $m^2$ til byggilendi og vídd 1.435 $m^2$ til útkoyring og veg, sambært kortskjali dagfest 4. oktober 2004 av nevndini, treytað av at vegurin verður gjørdur við minst 6 m breiðari koyribreyt.

Ein minniluti, Jákup Suni Joensen, tekur støðu á seinri fundi.

Harumframt samtykti nevndin at heita á býráðið um at broyta ásetingarnar fyri eystara part av B9 økinum í beinari linju frá verandi kaikanti, uml. 6.290 $m^2$, at umfata neystabygging og annað smábátavirksemi.

**Ískoyti:**
Í skrivi frá p/f Faroe Agency verður víst á, at russar hava ynski um at byggja oljutangar og goymslu til pakning á Sundi. Víðari verður víst á, at neystaætlanin forðar fyri einari víðari útbygging av bryggjuni.

**Tilmæli:**
Við tí í huga, at neystaætlanin kann forða fyri aðrari vinnuligari menning á vinnu- og havnaøkinum á Sundi, mælir havnameistarin til at útseta málið.

**Havnarnevndin 29. oktober 2004:** Ein meiriluti, Bjarti Mohr, Jákup Suni Joensen og Leivur Hansen, samtykti at heita á umsitingina um skjótast gjørligt at kanna, hvussu ítøkiligar vinnuætlanirnar á Sundi eru, og at útseta støðutakanina til neystaætlanina, til greiða er fingin á hesum.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Tórfinn Smith, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Sjúrður Olsen, býráðslimur, krevur málið fyri býráðið til støðutakan.

**Býráðið 25. november 2004:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Leivur Hansen um at beina málið aftur í havnanevndina, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jákup Suni Joensen, Bjarti Mohr, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir og Leivur Hansen

Ímóti atkvøddu: Schumann Hjaltalin, Høgni Mikkelsen, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen, Tórfinn Smith og Jan Christiansen

Greiddu ikki atkvøðu: Heðin Mortensen og Jógvan Arge.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið í byggi og býarskipanarnevndini 4. oktober 2004, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Høgni Mikkelsen, Schumann Hjaltalin, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen; Tórfinn Smith, Jógvan Arge og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Jákup Suni Joensen, Bjarti Mohr, Elin Lindenskov, Hildur Eyðunsdóttir og Leivur Hansen.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:35**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jákup Suni Joensen | Høgni Mikkelsen |
| Bjarti Mohr | Schumann Hjaltalin | Sjúrður Olsen |
| Beate L. Samuelsen | Tórfinn Smith | Elin Lindenskov |
| Hildur Eyðunsdóttir | Jógvan Arge | Leivur Hansen |
| Annfinn Brekkstein | Jógvan Thomsen | Eyðfinnur Lenvig |
| | Jan Christiansen | |